# Til minnis um
# Sólgerð Djurhuus

f. 4. februar 1941 – d. 3. juli 2003



Av tí, at vit vóru fleiri í bindiklubbanum, sum ikki høvdu høvi til at fylgja tær til títt síðsta hvíldarstað, vilja vit allar í bindiklubbanum minnast teg við hesum fáu orðum.

Góða Sólgerð! Ja, løgið er at samlast aftur í bindiklubbanum nú eftir summarfrítíðina og tú ikki ert ímillum okkum. Tað eru yvir 20 ár síðan, at tú komst upp í bindiklubban, og hava vit sjey hitst so at siga einaferð um vikuna í øll hesi ár, burtursæð frá feriunum. Og so við eitt ert tú ikki ímillum okkum. Ískiljandi. Í juli í fjør vóru vit í summarhúsi saman við Jyllandi, og hvør skuldi tá trúð, at tað skuldi verða seinasta útferðin hjá tær við bindiklubbanum. Sjálvt um sjúkan longu tá var byrjað, so segði tú onki um tað. Soleiðis var eisini alla tíðina, tú tosaði onki um sjúkuna, hevði tað altíð gott, faktisk líka til á páskum, tá sjúkan hevði fingið yvirvald. Men soleiðis var Sólgerð. Tosaði lítið um seg sjálva, hugsaði meira um onnur.

Tey gomlu var hon sera góð við, og tí var tað heldur ikki so løgið, at hon gjørdist fyristøðukvinna fyri Umlættingarheimið og Ellisheimið. Hugnakvøld og onnur tltøk saman við teimum komu fram um alt annað. Hon respekteraði og hevði stóra virðing fyri teimum.

Eitt, sum serliga sermerkti Sólgerð, var hennara tokki til børn. Sjálvt um hon ongi børn átti, so hevði hon stóra gleði av børnunum hjá Bjørg. Ein avgera góð mostir. Nú var tað sjálvandi ommudidd børnini, sum hon ofta tosaði um.

Børnini hjá okkum øðrum í bindiklubbanum mintist hon so sanniliga eisini til. Altíð til reiðar við einari hjálpandi hond, tað verið seg til barnadóp, føðingardag, konfirmatión ella brúdleyp.

Sólgerð hevði eitt lætt sinni, var løtt at koma í kontakt við og gjørdi altíð nakað burtur úr merkisdøgum. Dámdi at samla fólk. Tað síðsta hon mangan tosaði um, var at halda silvurbrúdleyp, sum skuldi verða í november í ár, men tað náddi hon so ikki.

Við hesum orðum vilja vit allar, góða Sólgerð, takka tær fyri mangar góðar, skemtiligar og minnisríkar løtur.

Sorgin og saknurin hjá tær Palli man vera ógvuliga stórur. Tit bæði vóru so nær knýtt at hvørjum øðrum. Okkara tankar leita mangan til tín, og má Harrin styrkja teg í stóru sorg tíni. Eftir hava vit øll mong og góð minnir um Sólgerð, og tað er nakað, sum ikki verður tikið frá okkum.

Ærað verið minnið um Sólgerð

*Så stakket er livet hernede*
*å, hvorfor forstår vi dog ej*
*at sol og af smil at sprede*
*et væld på hverandres vej.*

**Bindiklubburin**


kostnaður: 250,-

Atgongumerkir fáast á Statoilstøðunum kring landið og í Kunningarstovuni í Havn



TIT KENNA SANGIRNAR: - JAG TRODDE ÄNGLARNE FANNS - NEI, SÁ TJUKK DU HAR BLITT - ENGLEVAKT - EN FÅR VÆRA SOM EN ER osfr.

Ole Ivars

Í MENTANARHÚSINUM
fríggjadagin 5. september kl. 23-04
Matstovan er opin áðrenn tiltakið. Borð kann bíleggjast á tlf. 218 714.

Í HØLLINI Á HÁLSI
leygardagin 6. september kl. 23-04

Hotel Føroyar bjóðar 3 rættir Ole Ivars Menu og gisting - Bílegg á tlf. 317 500

Hotel Føroyar FAXE ATLANTIC AIRWAYS STATOIL SMS





BÍLEGG PIZZA FRÍGGJANÁTT OG LEYGARNÁTT

HEIMKOYRING ALLA NÁTTINA

PIZZA 67 TEL. 35 67 67



fk Matseðilin

Hósdagin 28. aug: Kálvafrikasse

Fríggjadagin 29. aug: Entrecote

Leygardagin 30. aug: Lambasteik

Mánadagin 1. sep: Lazange

Týsdagin 2. sep: Fisk í fati

Mikudagin 3. sep: Karbonadir

***

Seinnaparts-TILBOÐ frá kl. 14.00:

Juniorburgari 22,00
Maxiburgari *ella* Búffsandwich 30,00

Matstovan í Hoyvík





AUTO -Dag & nátt- -Alt døgnið-

Vilt tú bil hýra - ring 311234

Nú fáast eisini Talutíðarkkort Føroya Tele Kall

BENZIN DIESEL KIOSK

AUTO 311234





HESA VIKUNA

Fríggjakvøldið
ladies night kl. 23.00 -01.00 | DJ Eyðfinn Drewsen
Double up kl. 00.30

Leygarkvøldið
DJ Eyðfinn Drewsen
Double up kl. 00.30

Discoteque er opið: Fríggjadag 23-04, leygardag 23-04

Discoteque Club 20
Tinghúsvegur • Tórshavn • Tlf. 31 56 28
www.club20.fo



FRÍGGJAKVØLDIÐ 29. AUGUST
TERJI RASMUSSEN & KIM HANSEN
KONUFÓLK ÓKEYPIS ATGONGD ÁÐRENN KL. 01:00
OPIÐ FRÁ KL. 23:00 - 04:00

LEYGARKVØLDIÐ 30. AUGUST
Discoteque
v/Ottar í Funningstovu
OPIÐ FRÁ KL. 23:00 - 04:00

PLATFORM discoteque

VINN EINA FERÐ VÁGAR - KEYPMANNAHAVN T/R INNI Á WWW.PLATFORM.FO
MAERSK AIR



Klubbadansur

Leygarkvøldið 30. august spæla

COCKTAIL

HAVNAR KLUBBI Stovnaður 1799



Felagið TÓRSHØLL

Í vikuskiftinum spæla

COCKTAIL úr Klaksvík

Leygarkvøldið Bingo kl. 20.00

Týskvøldið Sjavskapping kl. 19.00



Kaggin

Hóskvøldið spæla
Jens Marni Band
double up kl. 21.00-22.00

Fríggja- og leygarkvøldið
Jens Marni Band

Leygarkvøldið 30. august
Hugnakvøld kl. 19.30
Ymiskur góður matur úr sjónum
Kokkur: Birgir Enni
Kostnaður kr. 150,-

www.kaggin.fo



Fríggjakvøldið
- dyrnar lata upp kl. 22
*PARTY KVØLD*
*DJ Cool & DJ King skipa fyri*
*Ladies night til kl. 01*

Leygarkvøldið
- dyrnar lata upp kl. 22
*90'ara kvøld*
*DJ King & DJ Cool skipa fyri*

BAROK



NÁTT-BUSSURIN
hjá Øssuri Christiansen

*Koyrt verður leygarkvøld:*

**Vágaleiðin (tlf. 217753)**

| | |
|---|---|
| • Úr Vágunum | *bert eftir avtalu* |
| • Tórshavn - Vágar | kl. 04.30 |

**Vestmannaleiðin (tlf. 217752)**

| | |
|---|---|
| • Vestmanna - Tórshavn | kl. 23.30 |
| • Tórshavn - Vestmanna | kl. 00.30 |
| • Vestmanna - Tórshavn | kl. 03.30 |
| • Tórshavn - Vestmanna | kl. 04.30 |

(Koyrt verður um Kvívík og Kollafjørð eftir avtalu)

Onnur kvøld kann koyrast eftir avtalu

Tlf. 424254



Isaksen's Bussar
44 16 87 - 21 16 87 - 22 16 87

Booking: Tel. +298 44 16 87 Fax. +298 44 18 87 E-mail: kiki@post.olivant.fo

* FO-660 Søldarfjørður, The Faroe Islands *

Busskoyring – til eitthvørt endamál
Bussar í ymiskum støddum,
frá 10 pers upp til 52 pers.
5 ymiskar støddir + handikaplift.
Vit koyra innan- og uttanlands.
Turist - fótbólt - bindiklubbar - útferðir - leigutúrar
Ring og fá eitt tilboð og hoyr nærri.